# Reingerðarfólk

Søkt verður eftir fólki at gera reint hjá Havnar handverkarafelag skjótast gjørligt.

Talan er í fyrsta lagi um alla reingerð í Stoffalág 60.

Tann, ið settur verður, skal vera røkin, álítandi og duga at arbeiða sjálvstøðugt, og hava reina revsiváttan.

Starvið verður sett sambært sáttmálanum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Arbeiðstíðin er sett til 10 tímar um vikuna og er vanliga eftir kl. 15 yrkadagar.

Umsøkjarar eru vælkomnir at ringja til Eli Brimsvík, formann, tlf. 354802 fyri at hoyra nærri um starvið.

Umsóknir við møguligum viðmælum skulu sendast

Havnar Handverkarafelag
Stoffalág 60
Postsmogu 203
110 Tórshavn
Att: Eli Brimsvík.

Umsóknir skulu vera Havnar Handverkarafelag í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. januar 2009.

**Havnar Handverkarafelag**
**Sjúrðargøta 20**
**Box 203**
**FO-110 Tórshavn**

Starvslýsing

Heimatænastan

## Røktarstarvsfólk til Korndalsbýlið á Eiði

Søkt verður eftir røktarstarvsfólki til Korndalsbýlið á Eiði at arbeiða 28 tímar um vikuna í skiftandi vaktum at byrja 01.03.2009.

**Førleiki**
- Hevur útbúgving sum heilsurøktari ella heilsuhjálpari
- Fakligan áhuga fyri primera økinum
- Hevur hug og hegni at veita røkt og umsorgan
- Tekur undir við visiónini um at skapa eitt heimligt umhvørvi
- Góð evni at samstarva og samskifta við búfólk, avvarðandi, starvsfelagar og leiðslu

**Setan**
Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin í løtuni er Heimatænastan Vágar/Norðstreymoy.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Helfrid Poulsen, deildarleiðara á tlf. 423546 / 762259

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til økisleiðaran á tlf. 762201.

**Umsókn**
Sendi eina skrivliga umsókn saman við prógvið og møguligum viðmælum til:

Heimatænastan Vágar/Norðurstreymoy
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari
Hornavegur 12 Heilsumiðstøðin
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 30. januar 2009 kl. 15.00.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

FØROYA HANDILSSKÚLI



## Akademiútbúgvingin, várhálvan 2009

Treytað av nóg stórari luttøku, verða í vár hesar lærugreinar á akademiútbúgvingini:

**Tórshavn**

| | |
|---|---|
| Flutningur og flutningsjura | týsdagur |
| Leiðsla í verki | mánadagur |
| Sølubúskapur | hósdagur |
| Vinnubúskapur | hósdagur |

Tilmelding á Føroya Handilsskúla í Tórshavn.

**Kambsdalur**

| | |
|---|---|
| Flutningur og flutningsjura | hósdagur |
| Sølubúskapur | hósdagur |

Tilmelding á Føroya Handilsskúla á Kambsdali

Undirvísingin byrjar í viku 6 og er eitt kvøld um vikuna frá klokkan 18.00–21.20.

Tilmeldingarfreistin er 19. januar 2009.

Innskrivingarseðil og kunning um akademiútbúgvingina finnur tú á heimasíðu skúlans, www.fh.fo. Til ber eisini at venda sær til skúlan á tlf. 31 71 77.

SENDISTOVAN

**FØROYA HANDILSSKÚLI**

**Postsmoga 177**
**110 Tórshavn**
**Tel 31 71 77**
**Telefax 31 33 74**
**www.fh.fo**

**Kambsdalur**
**530 Fuglafjørður**
**Tel 44 49 00**
**Telefax 44 49 01**
**www.fhk.fo**



# Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

### Pedagogur til Dagstovnin á Løgmannabreyt

Tórshavnar kommuna søkir vegna Dagstovnin á Løgmannabreyt eftir einum pedagogi til barnagarð at arbeiða 35 tímar um vikuna og einum pedagogi til vøggustovu at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 15. februar 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
Umsóknir við prógvum o. ø. skulu verða Dagstovninum á Løgmannabreyt, Boks 3027, 188 Hoyvík, í hendi seinast fríggjadagin 30. januar 2009.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Sofíu Nattestad, stovnsleiðara, á tlf. 31 91 05 ella 21 91 05. Heimasíðan: 123hjemmeside.dk/daglog.

**Tórshavnar kommuna**